# Hotel Vágar spennir seg út

**Leiðslan á Hotel Vágum hevur stórar framtíðarætlanir. Bæði í næstu framtíð og eisini longri fram. Útbygging er á skránni**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Ætlanir eru um at byggja upp í Hotel Vágar. Arbeitt verður eisini framvegis við ætlanum um at gera nýtslu av plastvirkinum - hvíta bygnininum - niðan fyri hotellið*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Tey arbeiða við fleiri ætlanum í senn á Hotel Vágum. Bæði útbygging av sjálvum hotellinum. Umbygging av plastvirkinum niðan fyri hotellið. Og sjálvandi skránni fyri komandi vetur.

Arbeitt verður við útbyggingarætlanum á Hotel Vágum, upplýsir Kári Hentze, leiðari á hotellinum.

Hann sigur, at søkt er um at sleppa at byggja upp í hotellið niðan móti vegnum. Biðið varð um loyvi at byggja tvær hæddir. Men tað endar nokk við einari, sigur hann. Talan verður um vanlig hotelrúm.

Síðan er ætlnain at broyta nakað í niðaru hædd á verandi bygningi. Tað er so, sigur Kári Hentze, at veitsluhølini eru í trengra lagi, og ætlanin er at víðka tey í niðaru hæddi. Tað ger so aftur, at tey gistingarrúmini, sum har eru, mugu burtur. Tey fáast so aftur við at byggja upp í hotellið niðaneftir, sigur hann.

Tosað hevur fyrr verið um at innrætta plastvirkið niðan fyri hotellið til hotelrúm, skeiðshøli og ráðstevnuhøli.

Seinnu tíðina hevur ikki so nógv verið at hoyrt um tær ætlaninar. Men Kári Hentze sigur, at arbeitt verður framvegis við ymsum ætlanum fyri tað húsið. Akkurát hvat tað verður til, vi hann ikki siga beint nú.

Vetrarskráin hjá Hotel Vágum byrjar leygardagin 11. oktober. Tá verður tann fyrsta av teimum sonevndu oktoberveitslunum, sum hotellið fer at skipa fyri. Somuleiðis verða tiltøkini í november og januar nevnd við mánaðarnavninum og eini veitslu afturút.

Ætlanin er at hava slík tiltøk annaðhvørt leygarkvøld í vetur, sigur Kári Hentze. Tað verður skipað soleiðis »a la carte« við dansi aftaná. Dansurin verður almennur.

Tann 25. oktober verður afturvendandi tiltakið við vínsmakking, ella vínskeiði, sum Kári Hentze nevnir tað, aftur á skránni. Tað varð fullteknað beinanveg, lýst varð við tí.

December fer allur, sum hann er, at kalla til jólaborðhaldini. Fleiri fyrispurningar eu longu komnir, so har fer nokk at vera fult eisini, letur leiðarin at.

Út á várið veðra aftur útferðir gjørdar ymsastaðni í oynni. Og helst verður okkurt spilturnýtt tiltak á skránni næstu ferð, lokkar Kári Hentze við. Eitt nú fjallaklintring saman við Vága Bjargingarfelag.

Hóast summarið júst er farið, er klárt aftur til næsta summar. Tey væl umtóktu føroysku kvøldini verða afur, sigur Kári Hentze.

Um undirtøkuna hjá hotellinum sigur hann, at september hevur hilnast væl. Eitt sindur tunt sær enn út fyri oktober enn, men hannn uggar seg við, at vit skriva framvegis september í álmanakkanum.

# Gera talvuna greiðari

**Hóast gjaldsskipanin hjá Vágatunlinum nú riggar, eru fólk ikki heilt trygg við at brúka hana. Talvan er ov ógreið, halda fólk. Hetta skal nú bøtast uppá**

GJALDSKIPAN
*Edvard Joensen*



*Talvan á automatini við Vágatunnilin er ov ógreið, halda tey, sum umsita. Tí skal ein nágreinilig vegleiðing gerast, sum øll duga at lesa*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Talvan í automatini við Vágatunnilin er ov torskild, halda fólk, sum koyra gjøgnum tunnilin. Leiðslan fyri tunillin hevur gjørt av at upplýsa betri um, hvssu automatin skal brúkast.

Vit mugu gera eina kunningartalvu, sum sera greitt vísir, hvussu fólk skulu bera seg at við at brúka automatina, sigur Renhold Iskaksen, á skrivstovuni hjá Vágatunlinum. Líkt er til, at talvan, sum er, er ov torskild, og ikki nóg logisk uppsett, soleiðis at fólk kunnu fylgja eini samanhangandi gongd, tá tey gjalda, sigur hann. Tað tykist ov fløkjasligt hjá fólki at skula reika runt á talvuni at finna ymsu knøttarnar. Teir áttu at staðið í nátúrligari raðfylgju, heldur hann.

Tað skal nú bøtast um við at gera eina snøgga og greiða vegleiðing, sum øll skilja. Bæði føroyingar og útlendingar. Fyrr enn tað er gjørt, verður støðin helst ikki latin ómannað, heldur Reinhold Isaksen.

Í aðrar mátar riggar gjaldsskipanin nú eftir ætlan. Okkurt hendinga óhapp hevur verið, men tað kemst mest av umstøðum uttaneftir. So sum streymsliti og slíkum, sum ikki ber til at verja seg fyri.

Endalig góðkenning av tunlinum er vist rættiliga nær nú, heldur Reinhold Isaksen. Seinastu kanningarnar verða nú gjørdar. Men arbeiðið við at tryggja loftið og síkt inni í tunlinum er liðugt, og opið er allar sólarringin.

Ferðslan er framvegis nógv gjøgnum tunnilin. Eitt sindur minni enn hon var í juli. Men tað er ikki annað enn væntandi var. Tó koyra út móti teimum túsund bilunum gjøgnum tunnilin dagliga.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Clara A. S. Nielsen**
**Vestmanna**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið 23. september, 76 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni í Tórshavn leygardagin 27. sept. kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Agnar**

---



# Umhugsa at taka seg úr grundlógarnevndini

**Sambandsflokkurin umhugsar í løtuni um hann skal taka seg úr grundlógarnevndini. Javnaðarflokkurin sigur, at fæst ongin semja um tjóðskaparliga spurningin, fer hann eisini at umhugsa støðu sína í nevndini**

GRUNDLÓGARNEVNDIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vandi er nú fyri, at grundlógarnevndin heilt verður amputerað.

Báðir andstøðuflokkarnir, sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin eru farnir at umhugsa sína støðu í nevndini og um teir skulu taka seg úr nevndini ella ikki.

Tað eru nøkur orð hjá Løgmanni, sum hevur fingið teir báðar andstøðuflokkarnar at taka seg úr nevndini.

Í løgtinginum seinasta mikudag, bað Henrik Old, løgmann siga sína hugsan um, at einstakir flokkar í tinginum vórðu tvingaðir til at sita í grundlógarnevndin, hóast teir ikki tóku undir við at nevndin varð sett yvirhøvur.

Tað, hann sipaði til, var, at Løgtingið hevði samtykt at seta grundlógarnevndina við trimum umboðum úr hvørjum flokki á tingi, sum hava minst fýra tinglimir.

Av tí, at talan er um eina løgtingssamtykt, føla eisini flokkar, sum eru ímóti nevndini, at teir hava skyldu til at vera við í arbeiðnum.

## Óvæntað svar

Svarið frá Anfinni Kallsberg kom púra óvart á tingfólk.

Løgmaður segði, at ongin varð tvingaður at sita í grundlógarnevndini. Ongin kundi tvingað tinglimir til nakað sum helst, tí sambært stýrisskipanini, eru tinglimir bara bundnir at teirra sannføring.

Arbeiðið í grundlógarnevndini er sostatt meiri eitt eitt tilboð enn ein skylda. Men stríðir tað ímóti sannføringini hjá einstøkum tinglimum at vera við í grundlógarnevndnini, kunnu teir lata vera, segði Løgmaður.

– Eftir hesum verða flokkar, ið ikki atkvøddu fyri at gera nýggja grundlóg, heldur ikki tvingaðir at vera við í grundlógararbeiðnum, segði løgmaður

## Umhugsa støðuna

Hetta svarið frá løgmanni hevur fingið bæði sambandsflokkin og javnaðarflokkin at umhugsa sína støðu í nevndini.

Sambandsflokkurin situr í hesum døgum og umhugsar, um hann rætt og slætt skal taka seg úr nevndini.

Flokkurin er ikki liðugur at viðgera málið og tí veit Lisbeth Petersen, floksformaður, ikki, hvat úrslitið verður.

Hon sigur, at sambandsflokkurin fer aldrin at atkvøða fyri eini føroyskari grundlóg.

– Av tí, at løgtingið hevur samtykt at seta nevndina, hava vit følt tað sum okkara skyldu at vera við í arbeiðnum, hóast vit eru ímóti tí, sigur hon.

Hon sigur, at tí hevur sambandsflokkurin verið við í grundlógararbeiðnum. Hon vísir eisini á, at sumt av tí, sum er avrikað í nevndini kann brúkast í eini nýggjari stýrisskipanarlóg og tað heldur hon vera skilagott arbeiði.

Men sjálvum grundlógararbeiðnum, er flokkurin ímóti.

– Vit skulu ikki hava eina føroyska grundlóg, tí vit hava eina grundlóg fyri alt ríkið og vit ætla okkum ikki úr ríkinum, hóast vit fáa sjálvberandi búskap.

– Og nú løgmaður sigur, at ongin kann tvingast at vera við í arbeiðnum, fara vit at umhugsa støðuna av nýggjum, sigur Lisbeth Petersen.

– Er tað ikki betur at vera við í arbeiðnum og royna at ávirka tað, heldur enn at seta seg sjálvan uttanfyri?

– Tað er tað, vit hava gjørt higartil. Men nú Løgmaður hevur gjørt støðuna greiða, at tað bara er okkara sannføring, vit skulu halda okkum til, umhugsa vit støðuna at nýggjum, sigur Lisbeth Petersen.

## Tjóðskaparligi spurningurin avgerandi

Eisini javnaðarflokkurin umhugsar støðuna.

Jóannes Eidesgaard, formaður floksins, sigur, at fyri javnaðarflokkin er tað umráðandi at fáa at vita, um ein semja kann fáast um tann tjóðskaparliga spurningin.

– Letur tað seg ikki gera, kunnu umboðini fyri javnaðarflokkinum koma til ta niðurstøðu, at so vilja tey heldur ikki vera við í grundlógararbeiðnum yvirhøvur.

Tí heitir Jóannes Eidesgaard á løgmann um at virka fyri, at spurningin um tjóðskaparligu støðu okkara verður tikin upp til viðgerðar beinanvegin fyri at fáa tann spurningin avgreiddan.

Hann heldur, at er vilji til staðar, eigur tað at bera til at finna eina orðing um tjóðskaparligu støðuna, sum allir partar kunnu semjast um.

– Men ein treyt fyri tí er sjálvsagt, at ikki onkur flokkur longu hevur sett sær fyri at brúka hetta sum eina politiska yvirlýsing at banka í høvdið á hinum flokkunum í einum komandi valstríði, sigur Jóannes Eidesgaard við týðiligari tilvísing til tjóðveldisflokkin.



*Sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin hava følt seg tvingaðar at vera í grundlógarnevndini. Men nú sigur løgmaður, at tey, sum ikki vilja vera við í arbeiðnum, kunnu bara fara og tað hevur fingið báaðar andstøðuflokkarnar at umhugsa sína støðu, sigur teir báðir floksformenninir, Lisbeth Petersen og Jóannes Eidesgaard*

